# Býráðsfundur 26.02.2024

**Býráðsfundur 26.02.2024 kl. 18.00**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhølið | |
| Hjástødd: | Súni í Hjøllum, borgarstjóri | x |
| | Heini S. Kristiansen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Jan Højgaard | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Rannvá í Túni Petersen | x |
| | Elsbet E. Magnussen, skrivari | x |

**Mál til viðgerðar:**

| | |
|---|---|
| Mál nr. 18/2024 – Ársroknskapurin hjá Bókasavninum 2023 | ALMENT |
| Mál nr. 19/2024 – Spælipláss í Skúlagarðinum | ALMENT |
| Mál nr. 20/2024 – Spælipláss í Vøggustovuni | ALMENT |
| Mál nr. 21/2024 – Umsókn um byggiloyvi til bilskýli | ALMENT |
| Mál nr. 22/2024 – Áheitan um ummæli av umsókn um sundurbýti – Umhvørvisstovan | ALMENT |
| Mál nr. 23/2024 – Kommunustýrisskipanin | ALMENT |
| Mál nr. 24/2024 – | AFTURLATIÐ |

**Mál nr. 18/2024 – Ársroknskapurin hjá Bókasavinum 2023** ALMENT

J.nr.: 2205-1-2023

Ársroknskapurin hjá Bókasavninum fyri 2023 er komin til góðkenningar hjá Nes kommunu. Roknskapurin er grannskoðaður av SPEKT.

Høvuðstølini í roknskapinum 2023 eru hesi:

**Útreiðslur:**

| | |
|---|---|
| Lønir | 68.894 kr. |
| Húsaútreiðslur | 4.500 kr. |
| Fólka- og meginbókasøvn | 76.953 kr. |
| Skúlabókasavnið | 37.945 kr. |
| Aðrar útreiðslur | 38.696 kr. |
| **Útreiðslur tilsamans** | **226.988 kr.** |

**<u>Inntøkur:</u>**

| | |
|---|---|
| Kommunust. móttikin í árinum | 176.167 kr. |
| Hølisvirði | 4.500 kr. |
| Landskassast. móttikin í árinum 80% | 37.057 kr. |
| Landskassast. restgjald 2016 - 20% | 9.264 kr. |
| **Inntøkur tilsamans** | **226.988 kr.** |

**<u>Ogn:</u>**

| | | |
|---|---|---|
| Bøkur | 2.764.875 kr. | |

**<u>Skuld:</u>**

| | | |
|---|---|---|
| Eginogn | | 2.764.875 kr. |
| **Javnvigar við** | **2.764.875 kr.** | **2.764.875 kr.** |

**Á fundi, tann 13.02.2024, mælir Mentanarnevndin til at taka undir við ársroknskapinum hjá Bókasavninum fyri 2023 sum hann er uppsettur.**

**Á fundi, tann 20.02.2024, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini og at taka undir við ársroknskapinum hjá Bókasavninum fyri 2023, sum hann er uppsettur.**

**Tilmælini hjá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

**<u>Mál nr. 19/2024 – Spælipláss í Skúlagarðinum ALMENT</u>**

<u>J.nr.: 1901-1-2024</u>

Spæliplássið í skúlagarðinum í Tofta skúla treingir til ábøtur. Ein áhugabólkur hevur havt uppskot frammi um, hvussu hesar kunnu gerast.
Tann 03.01.2024 var ástaðarfundur millum kommununa, skúlan, áhugabólkin og Innspark, har avtalað varð, at Innspark skuldi koma við einum tilboði uppá at dagføra sjálvan skúlagarðin innan verandi fíggjarkarmar.

Nes kommuna hevur fingið tilboð frá Innspark.

Síðan tilboðið er komið, hevur fundur aftur verið millum umboð fyri áhugabólkin, skúla og kommunu.

# Býráðsfundur 26.02.2024

**Á fundi, tann 26.02.2024, samtykti býráðið einmælt at taka av tilboðnum frá Innspark, og at fíggingin verður tikin av stovninum "Nýggi skúli – íløga".**

**Mál nr. 20/2024 – Spælipláss í Vøggustovuni ALMENT**

J.nr.: 1802-4-2024

Tann 24.01.2024 varð ástaðarfundur í Barnagarðinum millum umboð frá barnagarðinum, kommununi og Innspark. Endamálið var at finna eina loysn til spæliplássið í Vøggustovuni, har starvsfólkini sjálvi kundu koma til orðanna við teirra ynskjum.

Síðani er tilboð komið frá Innspark uppá eina heildarloysn til spæliplássið í Vøggustovuni samsvarandi ynskjunum hjá starvsfólkunum.

**Á fundi, tann 26.02.2024, samtykti býráðið einmælt, at taka av tilboðnum frá Innspark, og at fíggingin verður tikin av stovninum "Barnagarðurin íløga".**

**Mál nr. 21/2024 – Umsókn um byggiloyvi til bilskýli – Jústinus og Mary Hansen ALMENT**

J.nr.: 1210-10-2023

Í umsókn, tann 02.01.2024, søkja Mary og Jústinus Hansen um byggiloyvi til bilskýli á matr. nr. 427 á Heygsvegi 39.
Ætlanin er at byggja bilskýli paralelt við húsið, so at uttara síða er bygd á verandi garð. Bilskýlið er 3,7m breitt og 8m langt og verður sambært innsendu tekningum bygt 1,4m frá verandi marki.

Í samband við umsóknina vil Tekniski leiðarin mæla til, at Nes kommuna ber so í bandi, at markið hjá umsøkjaranum móti vegnum verður ájavnt við verandi garð.

**Á fundi, tann 14.02.2024, mælir Tekniska nevnd til at játta byggiloyvi til bilskýli sambært innsendu tekningum. Harafturat verður mælt til, at Tekniska umsiting fær heimild at samráðast við umsøkjararnar um rætta markið upp móti vegnum.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

# Býráðsfundur 26.02.2024

**Mál nr. 22/2024 – Áheitan um ummæli av umsókn um sundurbýti – Umhvørvisstovan ALMENT**
J.nr.: 1201-5-2023

Í telduposti, tann 15.01.2024, kemur áheitan frá Umhvørvisstovuni, har heitt verður á Nes kommunu um at ummæla umsókn um sundurbýti og at útvega brunaváttan viðvíkjandi hesari.

Talan er um sethús matr. nr. 699bg hjá Jaspuri Langgaard. Sethúsini eru í tveimum hæddum, við einari íbúð á hvørjari hædd, sum ætlanin er at sundurbýta til eigaraíbúðir.

**Á fundi, tann 14.02.2024, mælir Tekniska nevnd til at loyva sundurbýtinum.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 23/2024 – Kommunustýrisskipanin ALMENT**
J.nr.: 1101-5-2023

Í samband við, at kommunan í 2023 tók sær býarheiti, skal støða takast til, um býráðið skal vaksa frá 7 til 9 limir. Vísandi til framløguna hjá Eyðun Christiansen, stjóra í Kommunufelagnum, á kommunuskrivstovuni tann 29.01.2024, er tað sambært kommunustýrislógini býráðið, sum tekur avgerðina, og tað er ongin beinleiðis avleiðing av hesum, men tó verða býráðssessirnir í miðal uml 40 atkvøður bíligari.

Nevndirnar hjá kommununi noyðast framhaldandi at verða trý-manna nevndir, um býráðið veksur upp í 9 limir, orsakað av at kommunustýrislógin ásetir, at nevndirnar mugu verða ein minniluti í mun til býráðið.

Síðan framløguna hevur málið verið umrøtt í býráðnum.

**Á fundi, tann 26.02.2024, samtykti Býráðið einmælt, at tað framhaldandi verða 7 býráðslimir komandi setuna.**

**Mál nr. 24/2024 – AFTURLATIÐ**
J.nr.: 1101-8-2024